**Bygdaráðsfundur 02.05.2022 kl. 20.00**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum, borgarstjóri | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Elsbet E. Magnussen, skrivari | x |

**Mál til viðgerðar:**

| | |
|---|---|
| Mál nr. 44/2022 – Ársroknskapur – Roðin | ALMENT |
| Mál nr. 45/2022 – Ársroknskapur – Skálafjarða Sløkkilið | ALMENT |
| Mál nr. 46/2022 – Ársroknskapur – Nes kommuna | ALMENT |
| Mál nr. 47/2022 – Umsókn um byggiloyvi – Bergur Midjord og Oda Højgaard | ALMENT |
| Mál nr. 48/2022 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 49/2022 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 50/2022 – Tónleikastova | ALMENT |
| Mál nr. 51/2022 – Grundstykki matr. nr. 440q | ALMENT |
| Mál nr. 52/2022 – Umsókn um uppískoytisstykki – Ása Hansen | ALMENT |
| Mál nr. 53/2022 – Umsókn um uppískoytisstykki – Høgni Harryson | ALMENT |
| Mál nr. 54/2022 – Umsókn um uppískoytisstykki – Eyðbjørn Hansen | ALMENT |
| Mál nr. 55/2022 – Umsókn um uppískoytisstykki – Preben Andersen | ALMENT |
| Mál nr. 56/2022 – Umsókn um uppískoytisstykki – Andras Magnussen | ALMENT |
| Mál nr. 57/2022 – Bókavørður | ALMENT |
| Mál nr. 58/2022 – | AFTURLATIÐ |
| Mál nr. 59/2022 – Umbøn um møblar til skúlan | ALMENT |
| Mál nr. 60/2022 – Búmerki – Tofta skúli | ALMENT |
| Mál nr. 61/2022 – | AFTURLATIÐ |

**Mál nr. 44/2022 – Ársroknskapur – Roðin** **ALMENT**

J.nr.: 32102-3-2020

Ársroknskapurin hjá Roðanum fyri 2021 er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

| **Rakstur** | **2021** | **2020** |
|---|---|---|
| Lønir v.m. | kr. 71.747.163 | kr. 68.971.860 |
| Keyp av vørum og tænastum | - 10.993.805 | - 10.412.567 |
| Keyp av útbúnaði, netto | - 1.564.353 | - 1.039.794 |
| Leiga og viðlíkahald og skattur | - 1.026.054 | - 1.053.494 |
| Avskrivingar o.a. | - 0 | - 37.007 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | - 237.131 | - 244.525 |
| Tilskot til einstaklingar | - 926.330 | - 593.533 |
| Kravd gjøld, bøtur o.a. | - 0 | - 0 |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. (útr) | - 33.475 | - 80.340 |
| Flyting til landið (komm) | - 379.062 | - 364.509 |
| Keyps-mvg | - 738.140 | - 710.718 |
| **Útreiðslur tilsamans** | **kr. 87.645.513** | **kr. 83.508.347** |
| | | |
| Søla av vørum og tænastum | kr. 7.864.266 | kr. 7.803.568 |
| Rentuinntøkur og vinningsbýti | - 0 | - -414 |
| Flyting frá landinum | - 0 | - 210.506 |
| Flyting millum samstørv | - 2.647.124 | - 2.577.620 |
| Inngjøld frá luttakandi kommunum | - 77.134.123 | - 72.917.067 |

| | | |
|---|---|---|
| **Inntøkur tilsamans** | **kr. 87.645.513** | **kr. 83.508.347** |
| | | |
| Útreiðslur tilsamans | kr. 87.645.513 | kr. 83.508.347 |
| Inntøkur tilsamans | - 87.645.513 | - 83.508.347 |
| **Ársúrslit** | **0** | **0** |

| **Íløgur** | **2021** | **2020** |
|---|---|---|
| Bygging og løguframleiðsla (bygningur) | kr. 12.764.012 | kr. 2.954.991 |
| Keyps-mvg | - 787.465 | - 181.477 |
| **Nettokostnaður** | **- 13.551.477** | **- 3.136.468** |
| | | |
| Leypandi inngjøld frá komm., løgur bygningar | kr. 15.267.145 | kr. 4.155.733 |
| Skuld til komm. – ov nógv goldið í árinum | - -1.715.668 | - -1.019.265 |
| **Í alt** | **- 13.551.477** | **- 3.136.468** |
| | | |
| Bygging og løguframleiðsla (bilur) | kr. 0 | kr. 268.450 |
| Keyps-mvg | - 0 | - 15.600 |
| **Nettokostnaður** | **- 0** | **- 284.050** |
| | | |
| Leypandi inngjøld frá komm., løgur bilur | kr. 0 | kr. 400.000 |
| Skuld til komm. – ov nógv goldið í árinum | - 0 | - - 115.950 |
| **Í alt** | **- 0** | **- 284.050** |

**Á fundi tann 26.04.2022 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við ársroknskapinum hjá Roðanum fyri 2021 so sum hann er uppsettur.**

**Tilmæli hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 45/2022 – Ársroknskapur – Skálafjarða Sløkkilið ALMENT**
J.nr.: 1400002-1-2020

Ársroknskapurin fyri 2021 hjá Skálafjarðar Sløkkiliði er komin til ummælis hjá Nes kommunu.

| | **2021** | **2020** |
|---|---|---|
| **Inntøkur:** | | |
| Kommunur | kr. 2.469.070 | kr. 2.446.662 |
| Aðrar inntøkur | - 171.111 | - 231.616 |
| | **- 2.640.181** | **- 2.678.279** |
| **Útreiðslur:** | | |
| Lønir v.m. | kr. 1.252.362 | kr. 1.359.175 |
| Kostnaðir | - 372.090 | - 318.603 |
| Fyrisiting | - 107.508 | - 103.439 |
| Bilútreiðslur | - 292.558 | - 165.031 |
| Meirvirðisgjald | - 224.969 | - 51.480 |
| **Í alt** | **kr. 2.249.487** | **kr. 1.997.728** |
| **Úrslit áðrenn avskriving/rentur** | **kr. 390.694** | **kr. 680.190** |
| Avskrivingar | - 515.683 | - 322.654 |
| Rentur | - 5.112 | - 22.773 |
| **Avskrivingar/rentur íalt** | **- 520.795** | **- 345.427** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Úrslit** | **-** | **-130.100** | **-** | **334.763** |

**Fíggjarstøða**

| | | **31.12.21** | | **31.12.20** |
|---|---|---|---|---|
| Tøkur peningur | kr. | 699.912 | kr. | 5.881 |
| Útistandandi | - | 87.675 | - | 882.654 |
| Bygningur | - | 2.796.044 | - | 2.864.695 |
| Útgerð | - | 4.121.382 | - | 4.542.780 |
| **Ogn íalt** | **-** | **7.705.013** | **-** | **8.296.010** |
| | | | | |
| Skuld | kr. | 0 | kr. | 460.898 |
| Eginogn | - | 7.705.013 | - | 7.835.112 |
| **Eginogn og skuld íalt** | **-** | **7.705.013** | **-** | **8.296.010** |

**Á fundi tann 26.04.2022 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við ársroknskapinum hjá Skálafjarðar Sløkkiliðið fyri 2021 so sum hann er uppsettur.**

**Tilmæli hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

## Mál nr. 46/2022 – Ársroknskapur – Nes kommuna ALMENT

J.nr.: 1107-5-2021

Uppskot til ársroknskap hjá Nes kommunu 2021 er komið til góðkenningar.

**Høvuðsyvirlit yvir játtanarroknskapin fyri 2021**

| | | **Játtan** | | | **Roknskapur** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | **Rakstur og útlán** | | | **Rakstur og útlán** | | |
| Túsund kr. | | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Løgur** | **Útreiðslur** | **Inntøkur** | **Løgur** |
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | **5.022** | **0** | **-** | **4.792** | **0** | **0** |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 11. Felagsútreiðslur | 5.022 | - | - | 4.792 | - | - |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | **19.359** | **0** | **3.259** | **18.943** | **0** | **2.879** |
| | 20. Heilsumál | 1.626 | - | 70 | 1.648 | - | 60 |
| | 21. Almannamál | 17.733 | - | 3.189 | 17.295 | - | 2.819 |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | **13.635** | **-** | **6.643** | **13.319** | **-** | **6.016** |
| | 24. Mentan | 350 | - | - | 350 | - | - |
| | 26. Barnaansing | 13.285 | - | 6.643 | 12.969 | - | 6.016 |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | **4.223** | **-** | **950** | **4.207** | **-** | **999** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 4.223 | - | 950 | 4.207 | - | 999 |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | **5.030** | **0** | **181** | **4.763** | **2** | **174** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 531 | - | - | 534 | - | - |
| | 24. Mentan | 4.499 | - | 181 | 4.229 | 2 | 174 |
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | **5.155** | **-** | **6.812** | **5.190** | **-** | **6.115** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 995 | - | 65 | 884 | - | 54 |
| | 22. Íbúðarmál | - | - | 4.819 | - | - | 4.222 |
| | 24. Mentan | 160 | - | - | 154 | - | - |
| | 30. Umhvørvi | 1.039 | - | 486 | 1.119 | - | 362 |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 2.961 | - | 1.442 | 3.033 | - | 1.477 |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | **3.107** | **-** | **1.372** | **3.108** | **-** | **1.036** |
| | 30. Umhvørvi | 3.209 | - | - | 3.157 | - | - |
| | 31. Tilbúgving | 409 | - | 107 | 408 | - | 108 |
| | 32. Ráevnisvinna | 81 | - | 0 | 75 | - | - |
| | 37. Handil og vinna annars | - | - | - | - | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | -592 | - | 1.265 | -532 | - | 929 |
| **Tilsamans** | | **55.531** | **0** | **19.217** | **54.324** | **2** | **17.219** |
| § 20. | 22. Íbúðarmál | 840 | - | - | 841 | - | - |
| § 20. | 35. Sjóvinna | - | - | - | - | - | - |
| § 20. | 50. Rentur | 451 | - | - | 448 | - | - |
| § 20. | 52. Skattir og avgjøld | - | 64.359 | - | - | 69.862 | - |
| Tilsamans | | 56.822 | 64.359 | 19.217 | 55.613 | 69.864 | 17.219 |
| Yvirskot | | - | 7.537 | - | - | 14.251 | - |
| | | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot | Útreiðslur | Inntøkur | Yvirskot |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | | **-** | **-11.680** | **-** | **-** | **-2.968** | **-** |
| § 25. | 60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m." | 0 | 3.590 | - | -1.307 | 1.570 | - |
| **Nettokassaúrslit** | | **-** | **-8.090** | **-8.090** | **-1.307** | **-1.399** | **-92** |
| § 25. | 62. Afturgjald av skuld | 2.910 | - | - | 2.910 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | | **2.910** | **-8.090** | **-11.000** | **1.603** | **-1.399** | **-3.002** |
| Fígging: | | | | | | | |
| § 25. | 64. Útvegan av gjaldføri | - | 11.000 | - | - | 3.002 | - |
| Fígging íalt: | | - | 11.000 | 11.000 | - | 3.002 | 3.002 |
| **Samanlagt** | | **2.910** | **2.910** | **-** | **1.603** | **1.603** | **-** |

# Fíggjarstøða

| **Ogn** | **2020** | **2021** |
|---|---|---|
| **Goymslur og áogn** | **7.131** | **7.028** |
| Tænastu-, vøruskuldarar o.t. | 261 | 462 |
| Skatta-, toll- o.t. skuldarar | 375 | 380 |
| Skuld hjá stovnum og myndugleikum | 6.447 | 6.139 |
| Tíðaravmarkingar og onnur áogn | 48 | 47 |
| | | |
| **Virðisbrøv og tøkur peningur** | **1.808** | **605** |
| Banka- og girokontur | 1.793 | 598 |
| Kassakontur | 14 | 7 |

| | | |
|---|---|---|
| **Ogn tilsamans** | **8.939** | **7.632** |

| **Útjavningarkonta og skuld** | **2020** | **2021** |
|---|---|---|
| **Útjavningarkonta** | **-27.069** | **-30.037** |
| Salda primo | -25.318 | -27.069 |
| Rakstrar-, løgu og útlánsúrslit | -1.751 | -2.968 |
| **Langfreistað skuld** | **31.464** | **31.556** |
| Innanlandsskuld, vanlig lán | 31.464 | 31.556 |
| **Stuttfreistað skuld** | **4.544** | **6.114** |
| Skuld, sum er greidd til útgjaldingar | 3.290 | 5.206 |
| Skuld, avgjøld | -105 | -240 |
| Varðveitingar og trygdir | 240 | 303 |
| Onnur stuttfreistað skuld | 1.119 | 845 |
| **Útjavningarkonta og skuld tilsamans** | **8.939** | **7.632** |

**Á fundi tann 26.04.2022 mælir Fíggjarnevndin til at góðkenna roknskapin hjá Nes kommunu sum hann er uppsettur.**

**Tilmæli hjá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 47/2022 – Umsókn um byggiloyvi – Bergur Midjord og Oda Højgaard ALMENT**
.nr.: 234022-11-2019

Í teldubrævi, dagfest 06.04.2022, søkja Bergur Midjord og Oda Højgaard um byggiloyvi til sethús. Staðsetingin er í nýggju útstykkingini við Høganesvegin 85, matr.nr. 267i.

Húsini eru í tveimum hæddum við lágum einvegis takhalli, har kjallarahæddin er undir veghædd.

Bilhúsið, sum er partur av sethúsinum, verður bygt í grannamarkið.

Sí viðløgdu tekningar.

**Á fundi tann 25.04.2022 mælir Tekniska nevnd til at játtað byggiloyvi sambært innsendu tekningum, treytað av at grannasáttmáli fæst innan byggiloyvi verður útskrivað. Harafturat mælir nevdnin til, vísandi til kap. 1 grein 10 stk. 1 í byggisamtyktini at geva undantak í mun til nýtslustigið.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 50/2022 – Tónleikastova ALMENT**

J.nr.: 1901-2-2022

Ætlanir eru um at umvæla eina skúlastovu í Tofta skúla til tónleikastovu.

Tann 12.04.2022 kl. 14.00 var lisitatión á kommunuskrivstovuni. Hóast fýra fyritøkur vóru bodnar at bjóða, so kom bara eitt tilboð inn. Tilboðið er frá KBH og ljóðar á kr. 1.433.515.

Teknistovan í Gøtu mælir til at fara í samráðingar kunnu við KBH og at taka av tilboðnum.

**Á fundi tann 25.04.2022 mælir Tekniska nevnd til at fara í samráðingar við KBH um at gera møguligar sparingar/tillagingar og at taka av tilboðinum.**

**Á fundi tann 26.04.2022 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum frá Teknisku nevnd og at fíggja 1 mió av stovninum "skúlin íløga" og at ein eykajáttan verður givin á kr. 650.000 og verður tikin av tøkum peningi.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og hjá Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 51/2022 – Grundstykki matr. nr. 440q ALMENT**

Samtykt at beina málið aftur í Teknisku nevnd

**Mál nr. 52/2022 – Umsókn um uppískoytisstykki – Ása Hansen ALMENT**
J.nr.: 1205-8-2022

21. apríl 2022 søkir Ása Hansen um loyvi at víðka um sítt grundstykki við Heygsvegin 38, Toftir. Tað er serliga fyri at fáa pláss til at parkera bilarnar hjá teimum.

Sí viðløgdu kort og samskifti millum umsøkjara og tekn deild.

**Á fundi tann 25.04.2022 mælir Tekniska nevnd til at játta uppískoytisstykki.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 53/2022 – Umsókn um uppískoytisstykki – Høgni Harryson ALMENT**
J.nr.: 234022-3-2021

12. apríl 2022 søkir Høgni Harryson um eitt uppískoytisstykki sunnanfyri teirra grundstykki á Brekkukletti 25.

Stykkið skal brúkast til urtagarð.

Talan er um lendi burturav tveimum matriklum, sum Nes kommuna eigur, og bara liggja sum ótøkir millum vegirnar.

Somuleiðis sóknast umsøkjarin um eina loysn, hvussu almenna gongugøtan kann staðsetast tvørturvið ognini hjá teimum.

Sigast skal, at grannar í økinum hava áður havt ynski um eina almenna gøtu har á leiðini.

Sí viðløgdu skjøl.

**Á fundi tann 25.04.2022 mælir Tekniska nevnd til at játta uppískoytisstykki, sambært korti frá teknisku deild, við tí fyrivarni at gøta kann gerast í økinum.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 54/2022 – Umsókn um uppískoytisstykki – Eyðbjørn Hansen ALMENT**
J.nr.: 1201-15-2021

18. august 2021 kemur fyrispurningur frá Eyðbjørn Hansen um møguleikar at keypa lendi niðanfyri ogn sína við Høganesvegin 29.

Hetta lendið, sum liggur plant frá húsinum og oman ímóti hamrinum, hevur í áratíggir verið brúkt av fyrrverandi eigara av hesi ogn.

Festarin er kunnaður av umsøkjara, og hann viðmælir keypið sambært viðlagda korti.

**Á fundi tann 25.04.2022 mælir Tekniska nevnd til at játta uppískoytisstykki sambært viðhefta korti frá Teknisku deild.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 55/2022 – Umsókn um uppískoytisstykki – Preben Andersen ALMENT**
J.nr.: 1205-9-2022

Tann 22. apríl 2022 søkir Preben Andersen um loyvi at ogna sær $75m^2$ av geiranum sunnanfyri sítt grundstykki.

Nevndi geirin er 6,5m breiður, og við tað, at søkt verður um 3 m, verður atkoman niðan í økið omanfyri ikki skerd munandi.

Sí viðløgdu skjøl.

**Á fundi tann 25.04.2022 mælir Tekniska nevnd til at játta uppískoytisstykki.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 56/2022 – Umsókn um uppískoytisstykki – Andras Magnussen ALMENT**
J.nr.: 1205-10-2022

19 apríl 2022 kemur fyrispurningur frá Andras Magnussen um møguleikan at ogna sær nakað meira lendi til sítt grundstykki. Verandi grundstykki er $324m^2$, men breiddin er einans 11,70m.

Tað eru møguleikar av víðka um grundstykki báðumegin við. Fyrr var ein geil sunnanfyri, sum var nýtt til atkomu millum vegirnar.

Hendan farleiðin er longu avskorin longur niðri, og verður ikki brúkt í dag.

Sí viðløgdu skjøl.

**Á fundi tann 25.04.2022 mælir Tekniska nevnd til at játta uppískoytisstykki.**

**Tilmæli hjá Teknisku nevnd varð einmælt samtykt.**

**Mál nr. 57/2022 – Bókavørður** **ALMENT**

J.nr.: 2001-3-2022

Lis G. í Jákupsstovu, sum hevur verið í farloyvi frá starvi sínum sum bókavørður á bókasavninum, hevur sagt seg úr starvinum.

Nes kommuna hevur søkt eftir eftir nýggjum bókavørði. Talan er um parttíðarstarv. Tá freistin at søkja var farin tann 11. apríl 2022, var ein umsókn komin.

Umsóknin er frá Anna Mariu Olsen og Aneliu Philbrow, sum ynskja at røkja starvið saman. Anna Maria Olsen er lærari í Tofta skúla og býr í Saltangará. Anelia Philbrow hevur masterútbúgving í norðurlendskum viðurskiftum og býr á Toftum.

Anna Maria Olsen hevur røkt starvið sum bókavørður, meðan Lis G. í Jákupsstovu hevur verið í farloyvi.

**Á fundi tann 19.04.2022 mælir Mentanarnevndin til at seta Anna Mariu Olsen og Aneliu Philbrow í starvið sum bókavørðar á bygdabókasavninum.**

**Á fundi tann 26.04.2022 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.**

**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og Fìggjarnevndini vórðu einmælt samtykt og samtykt varð at seta Anna Mariu Olsen og Aneliu Philbrow í starv sum bókavørðar.**

**Mál nr. 59/2022 – Umbøn um møblar til skúlan** **ALMENT**

J. nr. 2100002-3-2020

Í teldubrævi tann 24. mars 2022 sendir skúlastjórin umbøn um fígging til møblar til eina skúlastovu. Eitt sett til eina skúlastovu varð keypt í fjør, og ynskiligt er aftur at keypa til eina stovu í ár.

Prísirnir eru rættiliga skiftandi í løtuni, men nýggjasti prísurin fyri eitt sett av møblum til eina skúlastovu er kr. 140.500.

**Á fundi tann 19.04.2022 mælir Mentanarnevndin frá at keypa møblarnar í ár, men at taka umbønina við í samband við fíggjarætlanina fyri 2023.**

**Á fundi tann 26.04.2022 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við Mentanarnevndini og mæla frá at keypa møblarnar í ár, men at taka umbønina við í samband við fíggjarætlanina fyri 2023.**

**Tilmælini hjá Mentanarnevndini og hjá Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Mál nr. 60/2022 – Búmerki – Tofta skúli** **ALMENT**

J.nr.: 1201-17-2021

Í samband við klæðing av Tofta skúla er ætlanin at prýða endaveggin omaneftir við búmerki skúlans. Teknistovan í Gøtu hevur innheintað tilboð uppá arbeiðið.

Tveir veitarar hava givið tilboð.

Tilboðið frá FD (uttan uppsetan) er á kr. 72.000 u/mvg.

Innspark hevur givið trý ymisk tilboð.

**Tilboð 1:**
Skelti 2076 x 2500mm v/ korona ljósi aftanfyri kr. 39.930

**Tilboð 2:**
Skelti 2076 x 2500mm v/ ljósi frammanfyri kr. 46.590

**Tilboð 3:**
Skelti 2076 x 2500mm úr PVC við fresaðum ljósi kr. 29.950

Øll skeltini hava dempara.

Afturat kostnaðinum kemur:

| | |
|---|---|
| Frakt | kr. 2.500 |
| Uppsetan | kr. 12.450 |

Allir prísir eru uttan mvg.

**Á fundi tann 19.04.2022 mælir Mentanarnevndin til at biðja um ráðgeving, fyri at fáa lýst tilboðini nærri, so at málið kann vera klárt til støðutakan til bygdaráðsfundin tann 02.05.2022.**

Til fundin í Teknisku nevnd vórðu tilboðini lýst nærri av fakfólki. Víst varð á, at góðskan varð í lagi í øllum tilboðunum, og at ongin stórvegis munur var á dygd og útgerð annars.

**Á fundi tann 25.04.2022 mælir Tekniska nevnd til at taka av tilboð 1 frá Innspark á kr. 39.930 u/mvg og av uppsetan og frakt á kr. 14.950 u/mvg.**

**Á fundi tann 26.04.2022 mælir Fíggjarnevndin til at taka undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd og at taka av tilboð 1 frá Innspark á kr. 39.930 u/mvg og av uppsetan og frakt á kr. 14.950 u/mvg.**

**Tilmælini hjá Teknisku nevnd og hjá Fíggjarnevndini vórðu einmælt samtykt.**

**Kunning:**

1. **Kvartal av roknskapinum hjá Nes kommunu**

| **Rakstur** | **1.kv.** | **Fíggjarætl.** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyristingar | 1.042.742 | 5.245.000 | 4.202.258 | 80,1% |
| §2 Almanna- og heilsumál | 5.187.529 | 20.849.000 | 15.661.471 | 75,1% |
| §3 Børn og ung | 3.403.599 | 14.670.000 | 11.266.401 | 76,8% |
| §4 Undirvísing | 1.415.485 | 4.520.000 | 3.104.515 | 68,7% |
| §5 Mentan og frítíð | 1.129.692 | 4.560.000 | 3.430.308 | 75,2% |
| §6 Teknisk mál | 1.334.621 | 5.100.000 | 3.765.379 | 73,8% |
| §7 Kommunal virki | 761.169 | 3.872.000 | 3.110.831 | 80,3% |
| **Rakstur í alt** | **14.274.837** | **58.816.000** | **44.541.163** | **75,7%** |
| §20 Inntøkur v.m. | -17.584.532 | -67.264.000 | -49.679.468 | 73,9% |
| **Rakstur pr. 31.03.2022** | **-3.309.695** | **-8.448.000** | **-5.138.305** | **60,8%** |

| **Íløgur** | **1.kv.** | **Fíggjarætl.** | **Munur** | **%** |
|---|---|---|---|---|
| §2 Almanna- og heilsumál | 0 | 70.000 | 70.000 | 100,0% |
| §3 Børn og ung | 367.673 | 350.000 | -17.673 | -5,1% |
| §4 Undirvísing | 222.063 | 1.300.000 | 1.044.938 | 82,9% |
| §5 Mentan og frítíð | 22.411 | 1.350.000 | 1.327.589 | 98,3% |
| §6 Teknisk mál | 8.767 | 5.190.000 | 5.181.233 | 99,8% |
| §7 Kommunal virki | 182.438 | 4.620.000 | 4.437.562 | 96,1% |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Íløgur í alt** | **803.351** | **12.880.000** | **12.076.649** | **93,8%** |
| **Íløgur og rakstur í alt** | **-2.506.344** | **4.432.000** | **6.938.344** | **156,6%** |